From:	Jan Sjóstein
To:	Jóannes N. Dalsgaard
Cc:	Bjarni Askham Bjarnason
Subject:	VS: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Date:	fríggjadagur, 25. juli 2025 10:45:43
Attachments:	image001.png
Importance:	High

Góðan dag

Sum Umhvørvismálaráðið vísir á, er skotbráið at gera viðmerkingar ógvuliga stutt. Valdi leisturin - at lata einum almennum grunni avmarkaðan ræðisrætt til almenna ogn í óavmarkaða tíð - er ráðnum kunnugt uttan fordømi. Fíggjarmálaráðið hevur tí ikki havt stundir at greina nærri og gera endaliga niðurstøðu um, hvussu uppskotið skal viðgerast í fíggjarlógarhøpi, m.a. hvønn týdning tað hevur, at ræðisrætturin við lóg verður lagdur til Húsalánsgrunnin, men kann latast aftur til landið sambært avtalu.

Fíggjarmálaráðið hevur, við neyðugum fyrivarni, hesar viðmerkingar:
Størsta forðingin fyri at fara undir ætlaða umbygging til lestrar- og ungdómsbústaðir á Eirargarði 2 beinanvegin tykist vera viðurskifti, sum snúgva seg um frámatrikkulering, tinglýsing, byggisamtykt o.a.

Greiðasta loysnin, eisini sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, er helst at gera eina frámatrikkulering av stykkinum við bygninginum, og at byggisamtyktin verður broytt. Mett verður, at henda loysnin ger, at tað fer at taka ov langa tíð, innan farast kann undir at umbyggja. Undir hesum umstøðum metir Fíggjarmálaráðið, at rættast er at fara undir eina frámatrikkulering og at broyta byggisamtyktina, og at løgtingslógin um at geva Húsalánsgrunninum ræðisrættin til bygningin Eirargarður 2 verður ein skiftislóg. Fíggjarmálaráðið hevur ikki mett um aðrar møguligar loysnir, t.d. at lýsa byrðu á ongina.

Fíggjarmálaráðið metir, at "ræði" ov illa lýst í lógaruppskotinum. Ynskiligt er við greiðari ásetingum ella viðmerkingum um eigararættindi, tinglýsing o.a.

Vinarliga – With regards

Jan Sjóstein
Fulltrúi / Advisor
Office: +298 352010
Mobile: +298 552010
jans@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo

Fra: Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>
Sendt: fríggjadagur, 25. juli 2025 08:26
Til: Jan Sjóstein <JanS@fmr.fo>
Emne: VS: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

(...)

Fra: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Sendt: hósdagur, 24. juli 2025 13:41
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Sigurð í Jákupsstovu <Sigurdj@us.fo>; us <us@us.fo>; Malene Egeberg Jacobsen <malenej@us.fo>; bustadir@bustadir.fo; tesa@estunlar.fo; Jógvan Ósá <Jogvan@bustadir.fo>
Cc: Margit Stórá <MargitS@umhvorvi.fo>; Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Góðan dag

Viðfest verður sent tykkum til ummælis uppskot til løgtingslóg umat geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn.

Løgtingslógaruppskotið skal gera tað møguligt hjá Húsalánsgrunninum at gera bygningin til lestrar- og ungdómsbústaðir at leiga út.

Ætlanin er at leggja uppskotið fram á Ólavsøku. Skotbráðið er tí ógvuliga stutt. Umhvørvismálaráðið heitir á tykkum um at senda okkum tykkara viðmerkingar **ikki seinni enn í morgin fríggjadagin 25.07.2025 kl. 12:00**.

Vinaliga sendi viðmerkingar tykkara til undirritaða joannesnd@umhvorvi.fo.

Hava tit spurningar kunnu til venda tykkum til Hilmar Høgenni deildarstjóra á tlf. 558090.

Vegna Umhvørvismálaráðið
Jóannes N. Dalsgaard
fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061

joannesnd@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo